RÚSDREKKASØLA LANDSINS

# Ársfrágreiðing 2020

# Innihaldsyvirlit


1. Inngangur ..... 3

2. Árið ..... 4

    2.1 Rúsdrekkasølan sum alkohol politiskt stýringsamboð ..... 4

    2.2 Rúsdrekkasølan selur alsamt meira veikt ..... 4

    2.3 Vaksandi tollfrí søla ..... 4

    2.4 Minkandi styrki í miðal ..... 5

    2.5 Avlopskrav til avgjald ..... 5

    2.6 Sølubúðir og tænasta ..... 6

    2.7 Pantskipan ..... 7

    2.8 Starvsfólkakostnaður ..... 7

    2.9 Árið samanumtikið ..... 7

3. Búskapur ..... 8

    3.1 Umsetningur ..... 8

    3.2 Sølugongdin gjøgnum árið ..... 8

    3.3 Rakstraravlopskravið ..... 8

4. Rúsdrekkasølan, nýtsla og hagtøl ..... 9

    4.1 Umsetningurin, býttur út á deildir ..... 9

    4.2 Sølugongd í litrum býtt í vørubólkar ..... 10

    4.3 Sølugongd í alkohol litrum býtt í vørubólkar ..... 10

    4.4 Vøruúrvæl býtt í vørubólkar ..... 11

    4.5 Fólkatal og gongdin í nýtslu pr. íbúgva ..... 12

5. Ársroknskapur fyri 2020 ..... 13

    5.1 Rakstrarroknskapur ..... 13

    5.2 Fíggjarstøða ..... 14

# 1. Inngangur

Rúsdrekkasøla Landsins er stovnur undir Føroya landsstýri. Rúsdrekkasølan virkar sambært løgtingslóg nr. 20 frá 10. mars 1992 við seinni broytingum og ásetingum í kunngerð nr. 144 frá 20. oktober 1992 við seinni broytingum.

Rúsdrekkasølan hevur til endamáls at innflyta og selja rúsdrekka. Rúsdrekkasølan hevur einkarætt til innflutning av rúsdrekka og við ávísum avmarkingum og undantøkum eisini einkarætt til sølu av rúsdrekka. Stovnurin skal í so stóran mun sum gjørligt, rekast út frá handilsligum sjónarmiðum, tó við neyðugum atliti til heilsulig sjónarmið.

Rúsdrekkasølan hevur átta handlar kring landið. Teir liggja í: Tórshavn, Klaksvík, Saltangará, Miðvági, Sandi, Trongisvági, Vestmanna og við Norðskála. Handlarnir virka eisini sum fløskumóttøkur. Harumframt er goymsla á Hjalla og fyrisitingin húsast í Tórshavn. Øll hølini eru leigumál.

Rúsdrekkasøla Landsins hevur umleið 34 fólk í føstum starvi. Harafturat eru upp til umleið 32 fólk í tímaløntum starvi.

Í hesi ársfrágreiðing verður tikið samanum árið 2020. Komið verður inn á gongdina í søluni, fíggjarlig viðurskifti og annað, sum hevur merkt árið og raksturin í 2020.

Tórshavn, tann 12. apríl 2021

Rógvi Andrias Fossádal
stjóri

# 2. Árið

## 2.1 Rúsdrekkasølan sum alkohol politiskt stýringsamboð

Síðan einkarsølan Rúsdrekkasøla Landsins (RSL) varð sett á stovn, er ein miðvís broyting í drekkimynstrinum í Føroyum farin fram. Frá í mestan mun at drekka spirtus er drekkimynstrið støðugt broytt til, at tað fyri tað fyrsta verður drukkið minni pr. íbúgva 15 ár og eldri. Ístaðin verður keypt minni av spiritusi og meira vín og øl, sum hevur lægri alkohol styrki. Hetta er at fegnast um, tí tað var júst hetta, sum upprunaliga var málsetningurin við rúsdrekkalógini og einkarsøluni.

Staðfestast kann, at einkarsølan hevur virka væl sum alkohol politiskt stýringsamboð hjá landinum.

Broytingin í drekkimynstrinum hevur tó hinvegin við sær minni inntøku hjá RSL – Og skyldast hetta avgjalds og príspolitikkin. RSL hevur tó áhaldandi arbeitt miðvíst við at tillaga raksturin til hesar broytingarnar í alkoholnýtsluni. Rakstrarkostnaðurin er eisini øktur nakað grundað á lønarhækkingar og aðrar vanligar príshækkingar í samfelagnum.

## 2.2 Rúsdrekkasølan selur alsamt meira veikt

Seinasta uppgerðin vísir at handlarnir hjá Rúsdrekkasøluni selja alsamt meira veikan løg, tí serliga sølan av spiritusi er minkað.

Av øllum vørusløgum vórðu seldir 205.040 litrar innanlands av reinum alkoholi í 2020. Í 2010 vórðu seldir tilsamans 180.816 litrar innanlands av reinum alkoholi.

Tølini vísa, at meira verður selt av víni, meðan minni verður selt av spiritusi. Í 2011 vórðu seldir 50.544 litrar innanlands av reinum alkoholi í víni. Í 2020 var talið 65.648 litrar av reinum alkoholi.

Í 2011 vórðu seldir 76.516 litrar innanlands av reinum alkoholi í spiritusi, men í 2020 var talið minkað heilt niður í 70.076 litrar.

Sølan av øli hevur at kalla óbroytt í mong ár, men hetta er broytt seinastu árini. Í 2011 vórðu seldir 52.202 litrar innanlands av reinum alkoholi í øli. Í 2020 vórðu 67.857 litrar av reinum alkoholi í øli seldir.

Endamálið við Rúsdrekkasøluni var m.a., at hon skuldi virka fyri at tálma nýtsluni. Nýtslan í 1992 var 8,8 litrar av reinum alkoholi fyri hvønn íbúgva 15 ár og eldri. Í 2020 var hon 6,5 litrar.

Í hesum tølum sæst tann veruleiki, at rúsdrekkavanarnir eru nógv broyttir síðan Rúsdrekkasølan varð sett á stov. Nógv meira veikt verður keypt enn sterkt, og fleiri njóta heldur enn bara at rúsa seg.

## 2.3 Vaksandi tollfrí søla

Minkar sølan av reinum alkoholi í Rúsdrekkasøluni, er øðrvísi við tollfríu søluni, sum hevur verið nógv vaksandi, serliga seinastu 10 árini. Sølan av tollfríum vørum er voksin 81% hetta tíðarskeiðið meðan sølan innanlands bert er voksin 12% - hetta meðan talið á borgarum 15 ár og eldri er voksið við 6%. Sølan í 2020 er merkt av at fólk hava keypt meira innanlands og minni tollfrítt – Ferðaavmarkingar o.l. vegna Covid-19 hava havt við sær eitt broytt keypsmynstur.

Sølan av tollfríum rúsdrekka í 2011 var 22.568 litrar av reinum alkoholi. Í 2016 var talið 35.936 litrar, og í 2020 vórðu seldir 20.894 litrar av reinum alkoholi tollfrítt.

Tollfría sølan av reinum alkoholi í spiritusi vaks úr 17.663 litrum í 2011 upp í 25.201 litrar í 2019 har hon sá út til at hava funnið eina fyribils legu. Í 2020 minkaði sølan tó til 13.957 litrar vegna Covid-19.

Sølan av reinum alkoholi í víni vaks úr 4.174 litrar av reinum alkoholi í 2011 upp í 11.126 litrar av reinum alkoholi í 2019 og 5.644 litrar av reinum alkoholi í 2020.

Samlaða tollfría sølan er nú áleið 1,6/0,9 litrar 2019/2020 í miðal fyri hvønn føroying árliga. Hetta talið skal leggjast aftrat teimum 6,5 litrunum, sum hvør føroyingur drekkur í miðal árliga.

Talið á 1,6/0,9 litrar 2019/2020 litrar av reinum alkoholi í miðal fyri hvønn føroying 15 ár og eldri árliga umfata tollfría sølu, sum Rúsdrekkasølan og bryggjaríini selja til flogvøllin og skip til proviantering. Tíverri eru ongi tøl eru tøk yvir søluna sjóvegis annars.

At munandi vøkstur er í tollfríari sølu, nýtist tó ikki at merkja, at nýtslan er vaksandi. Talan kann vera um, at nógv tollfrí søla, sum fyrr var í avgreidd í Kastrup og øðrum floghavnum uttanlands, nú í staðin verður avgreidd á flogvøllinum í Vágum.

## 2.4 Minkandi styrki í miðal

Hagtøl vísa eisini, at alkoholstyrkin í meðal av spiritusi, sum varð selt í Rúsdrekkasøluni í 1992, var 42,5 prosent. Í dag er meðalstyrkin av spiritusi, sum selt verður, 30,0 prosent.

Miðal alkoholstyrkin av øllum seldum vørum í Rúsdrekkasøluni minkaði úr 20,6 prosentum í 1992 heilt niður í 9,8 prosent í 2020.




Hesi yvirskipaðu tøl bera boð um broyttar vanar, og at sjálv alkoholstyrkin ikki longur hevur størsta týdningin fyri mong. – Dygd verður ráðfest heldur enn nøgd.

## 2.5 Avlopskrav til avgjald

Stovninum er í 2020 álagt at veita landinum 16,048 mió. kr.í avlopi í mun til 16,848 mió í avlopi í 2017. Munurin á 800 tkr. verður veittur sum avsláttur til loyvishavarar tvs. matstovur, gistingarhús, barrir o.l., ið nú fáa 14% í avslátri á borðvín og heitvín.

Avlopskravið er fastsett hvørt ár, sama um nýtslan veksur ella minkar. Eitt avlopskrav hevur verið álagt stovninum, síðan hann fór at virka í 1992. Málið við hesum var, at avlopið lutvíst skuldi nýtast at fíggja upplýsandi virksemi um skaðarnar av rúsdrekka og til at viðgera rúsdrekkamisnýtslu.

Rúsdrekkasølan hevur áhaldandi mælt politisku skipanini til at avtaka fasta avlopskravið og heldur leggja avgjøld á vørurnar, so avlopið fylgir nýtsluni. Fyrimunir við hesum er, at raksturin av Rúsdrekkasøluni verður minni viðbrekin fyri teimum búðskaparligu sveiggjum, ið við jøvnum millimbilum koma.

Gongdin hevur eisini verið, at færri litrar av reinum alkoholi verða seldir, og tí er vorðið alsamt truplari hjá Rúsdrekkasøluni at halda avlopskravið. Ein greið andsøgn er í, at stovnurin skal virka fyri at tálma nýtsluni, men noyðist at selja meira fyri at halda kravið. Eisini kann tann margháttliga støða íkoma, at neyðugt er at biðja um eykajáttan frá sama myndugleika, sum skal hava avlopið, fyri at halda kravið á 16,048 mió. kr.

Avlopskravið á fíggjarlógini á 16,048 mió., bleiv rokkið í 2020. Tað bleiv selt nakað meira av spiritusi, víni, øli og alkoholfríum vørum, meðan tað bleiv selt minni av heitvíni. Søluvøksturin í litrum stavar í einans frá øktari innanlands sølu. Tollfría sølan minkaði munandi í 2020 vegna Covid-19.

Leiðslan í Rúsdrekkasøluni hevur í tíðarskeiðnum millum 2011 og 2020 gjørt stórar tillagingar fyri at røkka økta avlopskravinum, sum í 2009 fór úr 11,848 mió. til 16,848 mió. í 2010 og síðan niður á 16.048 mió. í 2018 og frameftir. Arbeitt hevur áhaldandi verið ímóti einum skynsamari rakstri og bygnaði fyri at minka um útreiðslurnar uttan tó at niðurlaga tænastustøði, ið er ein av hornasteinunum aftanfyri eina einkarsølu.

Nýtslan í 2020 er enn á lægsta støði síðan RSL varð stovnað í 1992. Og er tað í trá við endamálið hjá RSL, ið m.a. sigur, at "Stovnurin skal, í so stóran mun, sum gjørligt, rekast út frá handilsligum sjónarmiðum, tó við neyðugum atliti til heilsulig sjónarmið."

## 2.6 Sølubúðir og tænasta

Arbeitt hevur eisini verið við at menna landsfyritøkuna – Ynski er, at hon verður á jøvnum føti við fremstu rúsdrekkasølur í norðurlondum og tí er umráðandi, at dentur áhaldandi verður lagdur á at uppfylla tann eftirspurning, sum viðskiftafólk okkara eftirspyrja og ynskja. Arbeitt verður tí javnt og miðvíst við at laga seg til tær broytingar, ið eftirspurningur og viðskiftafólk ynskja.

Í fleiri ár hevur leiðslan eftir fíggjarligum førimuni havt fokus á at dagføra og uppstiga handlarnar kring landið og hetta arbeiðið hevur gingið væl.

Ein nýggj søludeild bleiv latin upp við Norðskála í 2015 og ein í Vestmanna í 2017, umframt hetta vórðu fløskumóttøkurnar á deildunum í Tórshavn, Saltangará, Klaksvík og Miðvági eisini dagførdar í 2017 og 2018. Hetta var ein munandi uppstigan í tænastuni til viðskiftafólk okkara.

Mikudagin 9. september 2020 lat Rúsdrekkasøla Landsins upp í nýggjum og rúmligari hølum á Trongisvágsvegi 20 í Líðini í Trongisvági. Rúsdrekkasølan hevur húsast í hølunum á Drelnesi har eisini Føroya Bjór húsast, síðani Rúsdrekkasølan læt upp í Suðuroy í 1993. Hølini vóru vorðin ov smá og ótíðarhóskandi, so leita hevur verið í eina tíð eftir betri hølum, fyri m.a. at hækka tænastuna við størri úrvali, betri fløskumóttøku o.l. - Við nýggju hølunum verður hetta møguligt. Leiðslan fegnast um framstigið og vónar, at suðuroyingar fáa gleði av nýggja handlinum.

Rúsdrekkasølan hevur leingi havt ynski um, at uppstiga tænastustøðið og virksemi sítt í høvuðsstanum: Tórshavn/Hoyvík, so vit kunnu veita eina betur tænastu til økta fólkatalið í økinum.

Umbønir um, at lata upp fleiri sølubúðir í høvuðsstanum, eru tíverri ikki játtaðar av sitandi landsstýri ella av undanfarna landsstýri.

## 2.7 Pantskipan

Í 2016 og í 2020 mælti Rúsdrekkasøla Landsins til, at sett verður á stovn ein nýggj pantskipan, sum skal taka sær av at savna inn allar fløskur og íløt, krevja inn og gjalda út pantið og standa fyri at skilja og beina tilfar til endurvinningar. Einki ítøkiligt er tó hent síðani í hesum málið inntil nýggj samgonga varð skipað í 2019 – At lesa í Samgonguskjalinum 2019-2023 sæst undir "Orkumál og Umhvørvi" at *"Eisini eiga pantskipan og endurnýtsla at verða raðfest."*

## 2.8 Starvsfólkakostnaður

Starvsfólkakostnaðurin hækkaði í tíðarskeiðnum 2011-2020 til index 123. Starvsfólkakostnaður umboðar størsta part av rakstrarkostnaðinum í rakstrarroknskapinum, og svaraði hann í 2020 til 11% av umsetninginum.

## 2.9 Árið samanumtikið

Samanumtikið metir leiðslan, at árið eydnaðist væl hóast Covi-19, men neyðugt er áhaldandi at tillaga raksturin fyri at ganga øktu lønarútreiðslunum á møti. Eisini er broytta keypsmynstri við lægri inntøku sum fylgju ein áhaldandi avbjóðing, tá avlopskravið verið hildið fyri eyga.

# 3. Búskapur

## 3.1 Umsetningur

Seinastu tíggju árini hevur umsetningurin hjá Rúsdrekkasøluni ligið millum uml. 117 og 145 mió. kr.

Umsetningurin í 2020 er hin størsti, síðan Rúsdrekkasølan varð sett á stovn. Á talvuni niðanfyri sæst, at umsetningurin er væl hægri enn hini árini. Sølan í 2020 var 4,2 mió hægri enn í 2019 og góðar 9,7 mió hægri enn í 2018. Orsøkin til hesa hækking stavar í stóran mun frá fólkatilflyting umframt, at samfelagsbúskapurin er sera góður.

Umsetningurin fyri seinastu árini sær soleiðis út:

| (1.000 kr.) | 2020 | 2019 | 2018 | 2017 | 2016 | 2015 | 2014 | 2013 | 2012 | 2011 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Umsetningur | 145.745 | 141.513 | 135.991 | 133.161 | 127.438 | 125.766 | 119.286 | 118.800 | 120.140 | 117.659 |

*Talva 3.1: Árligi umsetningurin, 2011-2020*

## 3.2 Sølugongdin gjøgnum árið

Mánaðarliga sølan er rættiliga skiftandi gjøgnum árið. Gongdin í mánaðarligu søluni í 2020 býtir seg áleið eins og árið fyri. Mánaðirnir marts, apríl og august vóru merktir av Covid-19. Minst søla er vanliga í byrjanini av árinum, meðan summarsølan og sølan fram ímóti ársskiftinum vanliga er størri.

| (1.000 kr.) | 2020 | 2019 | 2018 | 2017 | 2016 | 2015 | 2014 | 2013 | 2012 | 2011 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Januar | 8.468 | 7.326 | 6.930 | 6.829 | 6.984 | 6.675 | 6.903 | 6.719 | 6.576 | 6.086 |
| Februar | 9.840 | 8.634 | 8.766 | 8.361 | 8.364 | 7.824 | 7.527 | 7.473 | 7.822 | 7.405 |
| Mars | 9.775 | 10.339 | 11.138 | 9.547 | 9.275 | 9.788 | 8.016 | 10.235 | 9.068 | 8.954 |
| Apríl | 9.564 | 10.727 | 9.537 | 10.218 | 10.025 | 9.220 | 8.883 | 7.859 | 9.301 | 9.436 |
| Mai | 12.479 | 12.775 | 12.710 | 11.526 | 10.763 | 10.433 | 10.295 | 10.887 | 10.814 | 9.823 |
| Juni | 12.964 | 12.931 | 12.582 | 12.450 | 11.557 | 11.299 | 10.477 | 11.210 | 10.949 | 10.400 |
| Juli | 17.967 | 15.853 | 15.315 | 14.403 | 14.775 | 14.558 | 14.332 | 13.054 | 13.844 | 14.402 |
| August | 9.860 | 12.425 | 11.429 | 10.597 | 9.830 | 9.709 | 9.406 | 9.499 | 9.025 | 8.543 |
| September | 10.481 | 9.527 | 9.310 | 10.191 | 9.432 | 8.901 | 8.298 | 8.006 | 7.955 | 9.010 |
| Oktober | 11.898 | 11.180 | 9.908 | 9.923 | 9.506 | 10.555 | 9.667 | 8.445 | 8.811 | 8.842 |
| November | 12.363 | 11.936 | 11.630 | 10.679 | 9.756 | 9.485 | 9.362 | 9.926 | 10.490 | 8.623 |
| Desember | 20.086 | 17.860 | 16.736 | 18.437 | 17.171 | 17.319 | 16.120 | 15.487 | 15.483 | 16.134 |
| **Íalt** | **145.745** | **141.513** | **135.991** | **133.161** | **127.438** | **125.766** | **119.286** | **118.800** | **120.140** | **117.659** |

*Talva 3.2: Umsetningurin fyri hvønn mánað, 2011-2020*

## 3.3 Rakstraravlopskravið

Kravið til avlop av rakstrinum varð í 2010 hækkað við útvið 50%, úr 11,848 mió. til 16,848 mió. Hetta hevur havt munandi príshækkingar á vørunum við sær, umframt umfatandi rationaliseringar, til tess at minka um útreiðslurnar. Hetta hevur borið við sær at viðlíkahald og útskifting av útbúnaði hevur verið tálmað fyrstu árini. Neyðugt hevur eisini verið, at havt eyka neyvt eftirlit er við øllum kostnaði. Avlopskravið varð í 2018 lækkað við 800 tkr. ið vórðu latnar sum avsláttur til loyvishavarar og sostatt ikki høvdu nakað fíggjarligt árin á Rúsdrekkasøluna.

Ein framgongd í umsetninginum frá 2019 til 2020, kann vera ábending um, at rúsdrekkanýtslan í Føroyum er voksin. Tó stavar hesin vøkstur nærum einans frá príshækkingum frá veitarum okkara, umframt at viðskiftafólk hevur keypt innalands, umframt betri góðsku heldur enn størri nøgdir.

Í 2020 vaks umsetningurin við 4,2 mió. í mun til undanfarna árið og eydnaðist tað sostatt at røkka avlopskravinum, sum varð ásett í løgtingsins fíggjarlóg fyri 2020.

Kravið var kr. 16.048.000 aftaná rakstrarútreiðslur og útreiðslur til høli, starvsfólk og umsiting. Tá árið varð gjørt upp, gjørdist avlopið bert kr. 16.351.987, tvs. ein munur uppá 303.987 kr.

Talvan 3.3 niðanfyri vísir gongdina í avlopi og játtan hjá RSL í tíðarskeiðnum 2011-2020.

| (1.000 kr.) | 2020 | 2019 | 2018 | 2017 | 2016 | 2015 | 2014 | 2013 | 2012 | 2011 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Avlopskrav | 16.048 | 16.048 | 16.048 | 16.848 | 16.848 | 16.848 | 16.848 | 16.848 | 16.848 | 16.848 |
| Avlop | 16.352 | 16.058 | 16.063 | 16.951 | 16.732 | 16.856 | 16.650 | 16.856 | 16.849 | 16.308 |
| **Munir** | **304** | **10** | **15** | **103** | **-116** | **8** | **-198** | **8** | **1** | **-540** |

*Talva 3.3: Avlop frá rakstrinum, 2011-2020*

At avlopskravið hækkaði so nógv í 2010, hevði við sær, at fleiri umskipanir vórðu gjørdar, bæði viðvíkjandi prísásetingini og í raðfestingunum innanhýsis. Førleikamenningin varð avmarkað, og væl minni varð brúkt til íløgur og viðlíkahald, enn í tíðini undan hækkaða avlopskravinum. Í dag verða førleikamenning, viðlíkahald og íløgur tó raðfest eftir tí orku, ið er til tess.

Við óbroyttum inntøkum kann vandi annars verða fyri, at hækkaða avlopskravið fær óhepna ávirkan á tænastustøðið, menningina og trivnaðin. Neyðugar íløgur í fløskumóttøkur, handlar, tólbúnað, førleikamenning o.l., ið skulu gerast, viðvirka til, at tað frameftir gerst alt truplari at liva upp til ásetta avlopskravið.

# 4. Rúsdrekkasølan, nýtsla og hagtøl

Hesin parturin viðgerð hagtøl og vísutøl fyri søluna í 2020 samanborðin við níggju undanfarin ár. Eisini verða viðmerkingar gjørdar til einstøku talvurnar.

## 4.1 Umsetningurin, býttur út á deildir

| (1.000 kr.) | 2020 | 2019 | 2018 | 2017 | 2016 | 2015 | 2014 | 2013 | 2012 | 2011 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Tórshavn | 62.219 | 52.928 | 50.930 | 51.401 | 52.665 | 53.980 | 54.200 | 53.925 | 54.841 | 55.117 |
| Klaksvík | 15.036 | 14.143 | 13.622 | 12.943 | 12.243 | 12.065 | 11.745 | 11.668 | 11.743 | 10.969 |
| Drelnes | 10.616 | 9.168 | 9.136 | 8.846 | 9.173 | 9.336 | 9.205 | 9.481 | 9.124 | 9.091 |
| Miðvágur | 7.906 | 7.155 | 6.970 | 6.897 | 6.517 | 6.740 | 6.960 | 6.874 | 6.961 | 6.693 |
| Sandur | 3.374 | 2.950 | 2.923 | 3.088 | 2.882 | 2.726 | 2.449 | 2.149 | 2.367 | 2.292 |
| Saltangará | 14.556 | 13.527 | 12.891 | 13.099 | 13.284 | 13.465 | 14.400 | 14.284 | 14.570 | 14.390 |
| Norðskáli | 8.861 | 7.452 | 7.193 | 6.797 | 6.136 | 3.848 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Vestmanna | 2.340 | 2.012 | 1.909 | 1.304 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Ordrar o.a. | 20.835 | 32.177 | 30.417 | 28.786 | 24.538 | 23.606 | 20.327 | 20.419 | 20.534 | 19.106 |
| **Íalt** | **145.743** | **141.513** | **135.991** | **133.161** | **127.438** | **125.766** | **119.286** | **118.800** | **120.140** | **117.659** |

*Talva 4.1: Umsetningur, 2011-2020*

Talvu 4.1 omanfyri vísir, at umsetningurin hevur verið javnur í árunum undan 2020. Útvið helmingurin av umsetninginum í sølubúðum stavar frá deildini í Tórshavn. Allar deildir hava selt meira í kr. enn undanfarna ár. Minni er selt av bíleggingum (ordrum o.l.) á høðusgoymsluni á Hjalla.

| (Vísutal) | 2020 | 2019 | 2018 | 2017 | 2016 | 2015 | 2014 | 2013 | 2012 | 2011 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Tórshavn | 113 | 96 | 92 | 93 | 96 | 98 | 98 | 98 | 99 | 100 |
| Klaksvík | 137 | 123 | 123 | 118 | 112 | 110 | 107 | 106 | 107 | 100 |
| Drelnes | 117 | 96 | 96 | 97 | 101 | 103 | 101 | 104 | 100 | 100 |
| Miðvágur | 118 | 110 | 110 | 103 | 97 | 101 | 104 | 103 | 104 | 100 |
| Sandur | 147 | 124 | 124 | 135 | 126 | 119 | 107 | 94 | 103 | 100 |
| Saltangará | 101 | 94 | 94 | 91 | 92 | 94 | 100 | 99 | 101 | 100 |
| Norðskáli | 230 | 194 | 187 | 177 | 159 | 100 | - | - | - | - |
| Vestmanna | 179 | 154 | 146 | 100 | - | - | - | - | - | - |
| Ordrar o.a. | 109 | 114 | 114 | 151 | 128 | 124 | 106 | 107 | 107 | 100 |
| **Íalt** | **124** | **120** | **116** | **113** | **108** | **107** | **101** | **101** | **102** | **100** |

*Talva 4.2: Umsetningur, vísutøl 2011-2020*

Í talvu 4.2 eru vísutølini sett til 100 í 2011 og í 2020 er samlaða vísutalið 124 í mun til í 2011.

Tað er stórur vøkstur í deildunum í Klaksvík og á Sandi í tíðarskeiðnum 2011-2020. Eisini er vøkstur í bíleggingum (ordrum o.l.) og er hetta orsakað av øktari tollfríari sølu. Bíleggingar verða vanliga

avgreiddir gjøgnum høvuðsgoymsluna á Hjalla. Afturgongd er í umsetninginum í Tórshavn, á Drelnesi og í Saltangará meðan sølan á deildini í Miðvági er at kalla óbroytt. Eisini sæst at deildirnar við Norðskála og í Vestmanna eru í støðugari menning. Samanumtikið er sølan í kr. vaksin og liggur relativt stabil kring landið.

## 4.2 Sølugongd í litrum býtt í vørubólkar

Í talvu 4.3 er sølan gjørd upp í litrum og býtt í vørubólkar. Eisini er sølan deild upp í innanlands sølu og tollfríari sølu. Nógv størsti parturin av søluni í litrum er øl. Síðani kemur vørubólkurin vín/cider og spiritus. Minstu bólkarnir eru heitvín og alkoholfríar vørur.

| (Litrar) | 2020 | 2019 | 2018 | 2017 | 2016 | 2015 | 2014 | 2013 | 2012 | 2011 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Spiritus** | **270.441** | **292.904** | **279.510** | **282.067** | **273.873** | **271.001** | **246.863** | **242.219** | **246.833** | **253.595** |
| *- Spiritus innanlands* | 233.317 | 221.779 | 206.971 | 208.903 | 205.159 | 201.846 | 191.510 | 192.252 | 200.028 | 207.354 |
| *- Spiritus tollfrítt* | 37.125 | 71.125 | 72.540 | 73.164 | 68.714 | 69.155 | 55.353 | 49.967 | 46.805 | 46.241 |
| **Vín/cider** | **651.353** | **639.676** | **622.358** | **593.487** | **541.097** | **529.221** | **508.121** | **490.093** | **476.567** | **463.205** |
| *- Vín/cider innanlands* | 607.063 | 552.512 | 538.583 | 513.898 | 463.801 | 461.460 | 456.776 | 447.109 | 440.193 | 427.156 |
| *- Vín/cider tollfrítt* | 44.289 | 87.164 | 83.775 | 79.589 | 77.295 | 67.761 | 51.345 | 42.984 | 36.374 | 36.049 |
| **Heitvín** | **8.692** | **10.823** | **9.796** | **9.786** | **9.555** | **10.041** | **9.741** | **9.741** | **9.236** | **10.067** |
| *- Heitvín innanlands* | 7.240 | 8.293 | 7.318 | 7.579 | 7.648 | 8.323 | 8.079 | 8.699 | 8.232 | 9.051 |
| *- Heitvín tollfrítt* | 1.452 | 2.531 | 2.478 | 2.207 | 1.907 | 1.718 | 1.662 | 1.042 | 1.004 | 1.016 |
| **Øl** | **1.249.245** | **1.181.942** | **1.166.007** | **1.142.219** | **1.086.767** | **1.060.514** | **1.025.672** | **980.493** | **1.036.304** | **1.032.874** |
| *- Øl innanlands* | 1.229.962 | 1.159.827 | 1.146.404 | 1.123.362 | 1.070.937 | 1.042.053 | 1.010.899 | 972.246 | 1.023.896 | 1.020.934 |
| *- Øl tollfrítt* | 19.282 | 22.114 | 19.603 | 18.858 | 15.830 | 18.461 | 14.773 | 8.247 | 12.408 | 11.940 |
| **Alkoholfrítt** | **5.945** | **5.740** | **4.023** | **3.900** | **2.268** | **1.200** | **776** | **928** | **1.401** | **935** |
| *- Alkoholfrítt innanlands* | 5.905 | 5.737 | 4.023 | 3.898 | 2.268 | 1.200 | 693 | 916 | 891 | 935 |
| *- Alkoholfrítt tollfrítt* | 40 | 3 | 0 | 2 | 0 | 0 | 83 | 12 | 510 | 0 |
| **Í alt** | **2.185.675** | **2.131.085** | **2.081.695** | **2.031.460** | **1.913.560** | **1.871.977** | **1.791.173** | **1.723.474** | **1.770.341** | **1.760.676** |
| *- Í alt innanlands* | 2.083.487 | 1.948.148 | 1.903.298 | 1.857.640 | 1.749.813 | 1.714.882 | 1.667.957 | 1.621.222 | 1.673.240 | 1.665.430 |
| *- Í alt tollfrítt* | 102.188 | 182.937 | 178.396 | 173.820 | 163.747 | 157.095 | 123.216 | 102.252 | 97.101 | 95.246 |

*Talva 4.3: Sølan í litrum í ymiskum bólkum, 2011-2020*

| (Vísutal, litrar) | 2020 | 2019 | 2018 | 2017 | 2016 | 2015 | 2014 | 2013 | 2012 | 2011 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Spiritus** | **107** | **116** | **110** | **111** | **108** | **107** | **97** | **96** | **97** | **100** |
| *- Spiritus innanlands* | 113 | 107 | 100 | 101 | 99 | 97 | 92 | 93 | 96 | 100 |
| *- Spiritus tollfrítt* | 80 | 154 | 157 | 158 | 149 | 150 | 120 | 108 | 101 | 100 |
| **Vín/cider** | **141** | **138** | **134** | **128** | **117** | **114** | **110** | **106** | **103** | **100** |
| *- Vín/cider innanlands* | 142 | 129 | 126 | 120 | 109 | 108 | 107 | 105 | 103 | 100 |
| *- Vín/cider tollfrítt* | 123 | 242 | 232 | 221 | 214 | 188 | 142 | 119 | 101 | 100 |
| **Heitvín** | **86** | **108** | **97** | **97** | **95** | **100** | **97** | **97** | **92** | **100** |
| *- Heitvín innanlands* | 80 | 92 | 81 | 84 | 84 | 92 | 89 | 96 | 91 | 100 |
| *- Heitvín tollfrítt* | 143 | 249 | 244 | 217 | 188 | 169 | 164 | 103 | 99 | 100 |
| **Øl** | **121** | **114** | **113** | **111** | **105** | **103** | **99** | **95** | **100** | **100** |
| *- Øl innanlands* | 120 | 114 | 112 | 110 | 105 | 102 | 99 | 95 | 100 | 100 |
| *- Øl tollfrítt* | 161 | 185 | 164 | 158 | 133 | 155 | 124 | 69 | 104 | 100 |
| **Alkoholfrítt** | **636** | **614** | **430** | **417** | **243** | **128** | **83** | **99** | **150** | **100** |
| *- Alkoholfrítt innanlands* | 632 | 614 | 430 | 417 | 243 | 128 | 74 | 98 | 95 | 100 |
| *- Alkoholfrítt tollfrítt* | - | - | - | - | - | - | - | - | - | 100 |
| **Í alt** | **124** | **121** | **118** | **115** | **109** | **106** | **102** | **98** | **101** | **100** |
| *- Í alt innanlands* | 125 | 117 | 114 | 112 | 105 | 103 | 100 | 97 | 100 | 100 |
| *- Í alt tollfrítt* | 107 | 192 | 187 | 182 | 172 | 165 | 129 | 107 | 102 | 100 |

*Talva 4.4: Sølan í litrum í ymiskum bólkum, vísutøl 2011-2020*

Talva 4.4 vísur gongdina í litrum/vørubólkum, sum indekseraði tøl. Størsta afturgongdin sæst í tíðarskeiðnum 2011-2020 í vørubólkunum spiritus og heitvín, innanlands, meðan størsta framgongdin í sama tíðarskeiði sæst í vørubólkinum vín/cider. Eisini er framgongd í søluni av øli og av alkoholfríum vørum. Hetta vísir greitt, at drekkimynstrið broytist soleiðis, at føroyingar nú keypa veikari sløg av rúsdrekka enn fyrr. Generelli mynstrið er tó at innanlands søla er jøvn og minkar, meðan tollfría sølan innan flest vørubólkar veksur.

## 4.3 Sølugongd í alkohol litrum býtt í vørubólkar

Í talvu 4.5 er sølan av rúsdrekkanøgdini umroknað til litrar av reinum alkoholi (alkohol litrar).

| (Alk. litrar) | 2020 | 2019 | 2018 | 2017 | 2016 | 2015 | 2014 | 2013 | 2012 | 2011 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Spiritus** | **84.054** | **93.864** | **92.745** | **95.832** | **92.721** | **93.925** | **88.079** | **88.849** | **91.331** | **94.179** |
| *- Spiritus innanlands* | 70.096 | 67.664 | 65.885 | 68.649 | 67.449 | 68.563 | 67.688 | 70.140 | 73.527 | 76.516 |
| *- Spiritus tollfrítt* | 13.957 | 26.201 | 26.860 | 27.182 | 25.382 | 25.362 | 20.391 | 18.709 | 17.804 | 17.663 |
| **Vín/cider** | **71.292** | **69.352** | **67.645** | **66.274** | **63.346** | **62.187** | **60.057** | **58.138** | **56.219** | **54.718** |
| *- Vín/cider innanlands* | 65.648 | 58.226 | 57.128 | 56.483 | 53.975 | 53.770 | 53.654 | 52.637 | 51.675 | 50.544 |
| *- Vín/cider tollfrítt* | 5.644 | 11.126 | 10.516 | 9.791 | 9.371 | 8.417 | 6.403 | 5.501 | 4.544 | 4.174 |
| **Heitvín** | **1.469** | **1.840** | **1.691** | **1.710** | **1.658** | **1.742** | **1.679** | **1.682** | **1.588** | **1.713** |
| *- Heitvín innanlands* | 1.227 | 1.435 | 1.273 | 1.337 | 1.334 | 1.452 | 1.408 | 1.516 | 1.424 | 1.554 |
| *- Heitvín tollfrítt* | 242 | 404 | 418 | 374 | 324 | 290 | 271 | 166 | 164 | 159 |
| **Øl** | **68.903** | **64.817** | **64.025** | **62.946** | **59.397** | **57.547** | **55.142** | **52.435** | **54.923** | **52.774** |
| *- Øl innanlands* | 67.853 | 63.566 | 62.935 | 61.903 | 58.538 | 56.548 | 54.364 | 52.008 | 54.300 | 52.202 |
| *- Øl tollfrítt* | 1.050 | 1.251 | 1.090 | 1.043 | 859 | 999 | 778 | 427 | 623 | 572 |
| **Í alt** | **225.934** | **230.332** | **226.475** | **227.035** | **217.233** | **215.401** | **204.957** | **201.104** | **204.061** | **203.384** |
| *- Í alt innanlands* | 205.040 | 191.349 | 187.591 | 188.644 | 181.296 | 180.333 | 177.114 | 176.301 | 180.926 | 180.816 |
| *- Í alt tollfrítt* | 20.894 | 38.983 | 38.884 | 38.391 | 35.936 | 35.068 | 27.843 | 24.803 | 23.135 | 22.568 |

*Talva 4.5: Sølan, gjørd upp í alkohol litrum, 2011-2020*

Talvan vísur, at samlaðu alkohol litrarnir innanlands minka javnt í tíðarskeiðnum 2011-2019, meðan tollfría sølan veksur. Árið 2020 er merkt av Covid-19 – Meir er selt innanlands og minni selt tollfrítt. Samlað sæst, at sølan í alkohol litrum í tíðarskeiðnum 2011-2020 so at siga er óbroytt. Ein afturgongd hevur tó verið í alkohol litrum seldir í sølubúðunum hjá RSL, meðan ein framgongd hevur verið í tollfríari søl, undantikið 2020.

| (Vísutal, alk.l.) | 2020 | 2019 | 2018 | 2017 | 2016 | 2015 | 2014 | 2013 | 2012 | 2011 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Spiritus** | **89** | **100** | **98** | **102** | **98** | **100** | **94** | **94** | **97** | **100** |
| *- Spiritus innanlands* | 92 | 88 | 86 | 90 | 88 | 90 | 88 | 92 | 96 | 100 |
| *- Spiritus tollfrítt* | 79 | 148 | 152 | 154 | 144 | 144 | 115 | 106 | 101 | 100 |
| **Vín/cider** | **130** | **127** | **124** | **121** | **116** | **114** | **110** | **106** | **103** | **100** |
| *- Vín/cider innanlands* | 130 | 115 | 113 | 112 | 107 | 106 | 106 | 104 | 102 | 100 |
| *- Vín/cider tollfrítt* | 135 | 267 | 252 | 235 | 225 | 202 | 153 | 132 | 109 | 100 |
| **Heitvín** | **86** | **107** | **99** | **100** | **97** | **102** | **98** | **98** | **93** | **100** |
| *- Heitvín innanlands* | 79 | 92 | 82 | 86 | 86 | 93 | 91 | 98 | 92 | 100 |
| *- Heitvín tollfrítt* | 152 | 254 | 263 | 235 | 204 | 182 | 170 | 104 | 103 | 100 |
| **Øl** | **131** | **123** | **121** | **119** | **113** | **109** | **104** | **99** | **104** | **100** |
| *- Øl innanlands* | 130 | 122 | 121 | 119 | 112 | 108 | 104 | 100 | 104 | 100 |
| *- Øl tollfrítt* | 184 | 219 | 191 | 182 | 150 | 175 | 136 | 75 | 109 | 100 |
| **Í alt** | **111** | **113** | **111** | **112** | **107** | **106** | **101** | **99** | **100** | **100** |
| *- Í alt innanlands* | 113 | 106 | 104 | 104 | 100 | 100 | 98 | 98 | 100 | 100 |
| *- Í alt tollfrítt* | 93 | 173 | 172 | 170 | 159 | 155 | 123 | 110 | 103 | 100 |

*Talva 4.6: Sølan í alkohol litrum, vísutøl 2011-2020*

Talva 4.6 vísur, at vísutalið fyri søluna av alkohol litrum er støðugt. Bólkurin spiritus er minkaður rættuliga nógv - serstakliga innanlands. Alkohol litrarnir í vørubólkinum vín og cider umframt øl, eru einastu bólkarnir, har alkohol litrarnir eru markant fleiri, enn teir vóru í 2011.

## 4.4 Vøruúrvæl býtt í vørubólkar

Talva 4.7 niðanfyri vísir vøruúrvælið býtt í vørubólkar fyri tíðarskeiðið 2011-2020. Skilt millum tal á vørum seldar innanlands og vørur seldar tollfrítt, umframt at samlaða vøruúrvalið er víst.

| (Vøruúvæl. nøgd) | 2020 | 2019 | 2018 | 2017 | 2016 | 2015 | 2014 | 2013 | 2012 | 2011 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Spiritus** | **1209** | **1.277** | **1.187** | **1.057** | **890** | **840** | **771** | **541** | **536** | **527** |
| *- Spiritus innanlands* | *708* | 742 | 688 | 601 | 456 | 406 | 376 | 355 | 359 | 350 |
| *- Spiritus tollfrítt* | *501* | 535 | 499 | 456 | 434 | 434 | 395 | 186 | 177 | 177 |
| **Vín/cider** | **1762** | **1.698** | **1.604** | **1.447** | **1.154** | **1.086** | **1.150** | **952** | **976** | **863** |
| *- Vín/cider innanlands* | *1465* | 1.425 | 1.295 | 1.203 | 908 | 890 | 938 | 842 | 858 | 753 |
| *- Vín/cider tollfrítt* | *297* | 273 | 309 | 244 | 246 | 196 | 212 | 110 | 118 | 110 |
| **Heitvín** | **103** | **129** | **96** | **101** | **89** | **90** | **80** | **69** | **67** | **58** |
| *- Heitvín innanlands* | *76* | 101 | 71 | 75 | 62 | 68 | 60 | 54 | 52 | 48 |
| *- Heitvín tollfrítt* | *27* | 28 | 25 | 26 | 27 | 22 | 20 | 15 | 15 | 10 |
| **Øl** | **732** | **710** | **647** | **576** | **379** | **314** | **230** | **217** | **281** | **217** |
| *- Øl innanlands* | *680* | 664 | 606 | 537 | 339 | 269 | 187 | 182 | 238 | 184 |
| *- Øl tollfrítt* | *52* | 46 | 41 | 39 | 40 | 45 | 43 | 35 | 43 | 33 |
| **Alkoholfrítt** | **70** | **69** | **44** | **40** | **18** | **9** | **14** | **14** | **16** | **6** |
| *- Alkoholfrítt innanlands* | *69* | 66 | 44 | 39 | 18 | 9 | 10 | 11 | 11 | 6 |
| *- Alkoholfrítt tollfrítt* | *1* | 3 | 0 | 1 | 0 | 0 | 4 | 3 | 5 | 0 |
| **Í alt** | **3866** | **3.883** | **3.578** | **3.221** | **2.530** | **2.339** | **2.245** | **1.793** | **1.916** | **1.699** |
| *- Í alt innanlands* | *2998* | 2.998 | 2.704 | 2.455 | 1.783 | 1.642 | 1.571 | 1.444 | 1.548 | 1.369 |
| *- Í alt tollfrítt* | *868* | 885 | 874 | 766 | 747 | 697 | 674 | 349 | 368 | 330 |

*Talva 4.7: Vøruúrvæl býtt í vørubólkar, 2011-2020*

Nógv største vøruúrvalið er í vørubólkinum vín/cider. Síðani koma vørubólkarnir spiritus og øl. Minstu bólkarnir eru heitvín og alkoholfríar vørur. Samanumtikið seldi Rúsdrekkasølan 3.866 ymisk sløg av løgi í 2020 í mun til 1.589 sløg av løgi í 2008.

Vøruúrvælið og tænasta verða áhaldandi ment í mun til tað ið rørir seg uttanlands umframt í tráð við tað viðskiftafólk í Føroyum eftirspyrja. Mett verður at hesin vøkstur fer at halda fram komandi árini og krevur hetta meir av starvsfólkum okkara, sum tó fegin arbeiða áhaldandi við at menna vøruúrvælið og kundatænastuna til frama fyri føroyingin og viðskiftafólk okkara sum heild.

## 4.5 Fólkatal og gongdin í nýtslu pr. íbúgva

Talva 4.8 niðanfyri vísur í fyrstu linju talið av fólki í Føroyum í aldrinum 15 ár og eldri tann 1. januar árini 2011-2020.

| Fólkatalið | 2020 | 2019 | 2018 | 2017 | 2016 | 2015 | 2014 | 2013 | 2012 | 2011 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Miðal 15 ár og eldri | 41.634 | 40.888 | 40.177 | 39.565 | 39.063 | 38.583 | 38.127 | 37.890 | 37.844 | 37.898 |
| Miðal tils. | 52.525 | 51.698 | 50.878 | 50.143 | 49.466 | 48.869 | 48.385 | 48.121 | 48.133 | 48.326 |
| **Nýtslan, alk.l. pr. íbúgva** | **2020** | **2019** | **2018** | **2017** | **2016** | **2015** | **2014** | **2013** | **2012** | **2011** |
| Alk.l./15 ár + (RSL) | 4,9 | 4,7 | 4,7 | 4,8 | 4,6 | 4,7 | 4,6 | 4,7 | 4,8 | 4,8 |
| Alk.l./15 ár + (Samlað í FO) | 6,5 | 6,4 | 6,4 | 6,5 | 6,3 | 6,4 | 6,3 | 6,3 | 6,6 | 6,4 |
| Tollfrítt (Samlað í FO) | 0,9 | 1,6 | 1,5 | 1,4 | 1,3 | 1,2 | 1,0 | 0,9 | 0,8 | 0,7 |

*Talva 4.8: Fólkatalið, 15 ár og eldri, tann 1. Januar 2011-2020 og miðal sølan av alkohol litrum*
*Kelda: Hagstovan og egin útrokning*

Um sølan av alkohol litrum gjøgnum RSL (*sí talvu 4.5*), verður sett í mun til talið av íbúgvum, sum eru 15 ár og eldri, sæst at talið av alkohol litrum hevur verið fallandi. Í 2011 er talið 4,8 alkohol litrar, og er síðani 4,9 alkohol litrar í 2020, sum ávíst í mittastu linju í talvu 4.8. Viðmerkjast skal tó at hetta bert umfatar tøl fyri søluna av rúsdrekka gjøgnum RSL.

Hinvegin vísir næst niðasta linjan tøl sum siga hvussu nógvar alkohol litrar føroyingar 15 ár og eldri í miðal keypa/drekka árliga. Hesi tøl umfata søluna gjøgnum Rúsdrekkasølu Landsins og sølu gjøgnum føroysku bryggjaríini. Her sæst, at nýtslan í Føroyum liggur stabilt á uml. 6,3 alk. ltr. til 6,6 alk.ltr. pr. íbúgva 15 ár og eldri í tíðarskeiðnum 2011-2020.

Afturat hesum tølum skal leggjast tað, sum verður selt tollfrítt og innflutt á annan hátt. Tað finnast ikki almenn hagtøl fyri hesa sølu. Tey tøl, sum síggjast niðast í Talvu 4.8 vísa tollfría vøru, seld gjøgnum RSL og føroysku bryggjaríini per. íbúgva 15 ár og eldri. Tað veruliga talið er óivað nakað hægri, tí her vantar tollfrít innflutt av ferðafólki við skipi og tollfrítt innflutt við ferðafólki, ið hevur keypt rúsdrekka uttanlands.

# 5. Ársroknskapur fyri 2020

Niðanfyri er ársroknskapurin hjá Rúsdrekkasølu Landsins fyri 2020 settur upp í mun til árið 2019. Roknskapurin fevnir um rakstrarroknskap, fíggjarstøðu og notur.

## 5.1 Rakstrarroknskapur

| | Ár 2020 | Ár 2019 |
|---|---|---|
| Inntøkur: | | |
| Vørusøla | 145.744.999 | 141.512.796 |
| Vørunýtsla | -103.243.844 | -100.401.226 |
| Skiftisavlop | 42.501.156 | 41.111.571 |
| | | |
| Útreiðslur: | | |
| Starvsfólkakostnaður | 15.562.428 | 15.587.566 |
| Avskrivingar | 2.254.251 | 2.052.985 |
| Annar kostnaður | 8.172.333 | 7.904.947 |
| Útreiðslur íalt | 25.989.012 | 25.545.497 |
| | | |
| Úrslit áðrenn fíggjarpostar | 16.512.144 | 15.566.073 |
| Fíggjarpostar | 8.165 | 22.762 |
| Roknskaparligt avlop | 16.520.308 | 15.588.836 |

| **Avrokning av avlopi, ásett á fíggjarlógini** | | |
|---|---|---|
| Roknskaparligt avlop | 16.520.308 | 15.588.836 |
| Avskrivingar | 2.254.251 | 2.052.985 |
| Íløgur | -2.422.573 | -1.584.174 |
| Nettoavlop | 16.351.987 | 16.057.647 |
| Avlop, ásett á fíggjarlógini | 16.048.000 | 16.048.000 |
| Munur | 303.987 | 9.647 |

## 5.2 Fíggjarstøða

| | 31.12.2020 | 31.12.2019 |
|---|---|---|
| **OGN:** | | |
| Støðisogn | 4.530.122 | 4.361.800 |
| Vørugoymsla | 13.935.908 | 11.607.009 |
| Vøru- og tænastuáognogn | 664.682 | 950.097 |
| Onnur áogn | - | - |
| Tíðaravmarkingar | 921.042 | 2.137.478 |
| Tøkur peningur | 3.764.111 | 3.760.018 |
| Ogn tilsamans | 23.815.865 | 22.816.403 |
| | | |
| **SKULD:** | | |
| Eginogn | 4.530.122 | 4.361.800 |
| Vøru- og tænastuskuld | 4.305.842 | 2.234.058 |
| Onnur skuld | - | - |
| Millumrokning við Gjaldstovuna | 9.237.310 | 11.054.080 |
| Tíðaravmarkingar | 4.115.209 | 3.478.464 |
| Meirviriðisgjald | 1.627.382 | 1.688.001 |
| Skuld íalt | 19.285.743 | 18.454.603 |
| Eginogn og skuld tilsamans | 23.815.865 | 22.816.403 |
| | | |
| Leasingskyldur | - | - |
| Leiguskyldur pr. ár pr. 31.12. | 6.221.900 | 3.632.300 |